# Atli noyðist at lesa hart




**Navn:**

## Atli skal siga okkurt um royðrina. Hvat veitst tú um hana?

## Her sært tú ymsar hvalir.




**Grindahvalur**

**Bóghvítihvalur**

**Royður**
**“Bláhvalur”**

## Orðalisti:

**snáva** stíga skeivt
**stúrin** mótfallin, bangin

**Hvat av hesum er satt um royðrina? Set ring um**

Tungt hjarta

Syngur

Svimur langt

Hevur sera hvassar tenn



Royður vigar líka nógv sum ein fílur

Størsta djórið nakrantíð

Kann vera undir í sjónum í ein mánaða



**Hvalurin etur Pinocchio og pápan. Ber tað til?**

___________________________________________

## Spurningar

Hví hevur Atli langan frunt? ____________________

____________________________________________

Hvørjum skal hann tosa/leggja fram fyri? _________

____________________________________________

Hvussu gekst hjá Atla at tosa/leggja fram? ________

____________________________________________

Hevur tú nakrantíð verið stúrin fyri at lesa fyri flokkinum? __________________________________

____________________________________________

## Hvat er serligt við myndini á s. 38?



**Stórhvalagildið** **Brot úr sanginum hjá Oskari Hermansen og Poul Arna Joensen**

1. Eitt leygarkvøld á Grynnuni har var eitt óført gildi,
ein stórhvalur varð túsund ár, og túsund honum fylgdu.
Hann kom undan Grønlandi, snýsandi og blásandi -
Leingi livi hvalurin - minst túsund ár afturat!

Kunnu hvalir blíva túsund ár? ______________

Hvussu leingi kunnu teir liva? ______________

3. Og “laffikøkan” hon var prýdd við túsund taratonglum.
Um hálsin høvdu grindahvalir band við sóknaronglum.
Brondingur og hemari, krossfiskur og rognkelsi
høvdu snollað Stórahval og skravað gjarið av.

Hvat er ein “laffikøka”? ______________

Hvussu nógv djór eru nevnd í hesum ørindinum? ______________

______________

4. Ein tindaskøta sló á krúss og reistist upp við borðið:
“Tá eingin annar sigur stórt, so biði eg um orðið.”
“Vælsignað, skøta, steðga, tú; vit mugu upp at blása nú,”
søgdu allir hvalirnir og tóku sjógv á bak.

Hvat ætlar tindaskøtan sær? ______________

______________

Hví noyðast allir hvalirnir frá borðinum? ______________

______________